gult cyan magenta svart



**SJEYTI. Tað er ikki heilt av tilvild, at eg velji at stava talið »sjeyti«, ístaðin fyri at skriva tølini 70. Tí júst í hesum liggur nakað viðkomandi, tá ið ein heilsa til Ólav á hansara føðingardegi skal skrivast, sigur Urd Johannesen, sum vegna Havnarkórið heilsar Ólavi**

# Ólavur Hátún sjeyti

FØÐINGARDAGSHEILSAN

*Urd Johannesen*

Tað er ikki heilt av tilvild, at eg velji at stava talið »sjeyti«, ístaðin fyri at skriva tølini 70. Tí júst í hesum liggur nakað viðkomandi, tá ið ein heilsa til Ólav á hansara føðingardegi skal skrivast,

## Tøl og tol

Ólavur hevur nógv ymisk ting, sum hann gongur upp í við lív og sál, og restina mugu hini so um. Eitt av hesum, hansara hjartabørnum, eru tølini. Hvussu oftani hava vit í Havnarkórinum ikki ypt øksl og lurtað við hálvum oyra, tá ið hann enn einferð staðfestir ta syrgiligu lagnu, okkara tøl fingu, tá ið tey vóru fordanskaði, ístaðin fyri, sum aðrastaðni í norðurlondum vóru meira logisk uppbygd? Sjálvur brúkar hann konsekvent »hin« mátan, og um onkur av okkum biður hann vælsignaðan spæla takt seksogtredivu umaftur, so letur hann sum um hann ikki skilur, hvat viðkomandi sigur, inntil hesin so gevur skarvin yvir og sigur tríatiseks ístaðin. Men tað, ið kemur inn ígjøgnum tað hálva oyrað, sum er opið, tá ið tann miðvísa indoktrineringin kemur, er so smátt byrjað at sodnað. Eg hevði als ikki dugað at ynskt Ólavi tillukku við teim hálvfjers árunum – ja, eg dugi ikki so frægt sum at stava hatta skrímslið av einum tali.

Soleiðis er. Ein verður ávirkaður av hesum manni, sum eg kom at kenna, tá ið eg í byrjanini av 1998 kom uppí Havnarkórið. Hann fer ikki bara framvið. Ein verður noyddur at fyrihalda seg til hann og taka støðu til tað, hann sigur og heldur. Tí hann heldur bara eitt. Einki við at vevja uttanum og siga »på den ene side og på den anden side«. Tað hevur hann als ikki tol til. Ikki so løgið, tí tað vildi verið torført at fingið so nógv av skafti og verið so málrættaður sum hann, um hann hevði havt tvey mál, eitt »på den ene side« og hitt »på den anden side«. Ólavur er einvegis. Beint fram. Koyrir á. Speadarin í botn. Henda einvegis koyringin elvir stundum til, at summi koyra uttanum, og at onkur samanstoytur er við onnur, ið eisini koyra einvegis men mótsattan veg. Vit í Havnarkórinum hava sett okkum upp í bussin og biða hann, í besta Hyacinth-stíl, ansa eftir mótkoyrandi ella kúnni á bønum. Hann krevur nógv av okkum, men sparir aldrin seg sjálvan.



## Orðini

Í kórinum plaga vit at skemta við, at Ólavur altíð er minst trý ár frammanfyri okkum í sínum ætlanum fyri kórið. Onkur av okkum helt, at nú, tá ið hann varð pensioneraður fyri gott tveimum árum síðani, fór farturin kanska ikki at vera so nógvur, og stígur at koma í tilgongdina til hansara annars stóra hugskotsbanka. Men nei, heldur tvørtur ímóti, tí nú hevði hann alla tíðina at hugsa í og finna uppá nýggj ráð. Soleiðis hava tvey tey seinastu árini verið serstakliga hendingarík fyri Havnarkórið, og vit hava luttikið í nógvum og sjálvi skipað fyri stórum tiltøkum við nógvum útlendskum gestaluttakarum. Serstakliga stuttligt hevur tað nú altíð verið, tá ið kórið hevur ferðast uttanlands og sungið. Hetta skapar ein serligan dám og Ólavur er eisini altíð við mitt í rokanum og tykist at stórtrívast ímillum okkum. Hann er altíð klárur við onkrari skemtiligari søgu frá teirri døgum, tá ið tey flestu av okkum kanska ikki vóru til. Dugur avbera væl at siga frá. Hevur orðini í síni makt, hóast tey kunnu tykjast eitt sindur ullint, tá ið tey koma út. Eg minnist, at eg hevði eitt sindur torført við at skilja hann í fyrstani, og helt, at orsøkin kanska var, at tankarnir vóru so langt frammanfyri sjálv orðini, at tey líkasum komu bóltandi aftaná.

At hann hevur orðini í síni makt kemur kanska serliga til sjóndar í hansara góða og viðhvørt skarpa penni. Tað er ikki óvanligt at lata eitt blað upp ein leygarmorgun og síggja eina grein, sum Ólavur hevur skrivað, ella eitt lesarabræv. Evnini eru mong og ymisk, alt frá rennibreyt til ríðing, frá kórsangi til ummælir av bókum. Tá ið ein lesur hansara greinar, kennir ein tað sum um, at væl er gáað um hvørt einasta orð, einki er tilvildarliga skrivað. Hartil sýnist hann eisini at hava eitt stórt innlit í tey ting, hann skrivar um. Frásøgnirnar bera eisini altíð brá av, at hansara persónur er tilstaðar og soleiðis gerast tær ikki kaldar endurgevingar.

Tað er serliga í nevndarhøpi, at eg kenni Ólavur. Við øllum teimum tiltøkum, sum Havnarkórið hevur verið við í, er neyðugt at hava nógvar fundir fyri at finna felags stev. Fyri okkum í nevndini í Havnarkórinum er tað ein hugnalig løta hvørja ferð, har tað eru stundir at dvølja við ymiskt annað, ið ikki beinleiðis stendur á fundarskránni. Saman við kaffi og køku sjálvandi. Og her er Ólavur í tí rætta elementinum. Okkurt søtt afturvið einari stuttligari søgu. So lena vit onnur okkum afturá og lurta. Ikki tí, viðhvørt vildu vit ynskt, at vit ikki høvdu nevnt júst hatta orðið, sum fekk tankarnar hjá Ólavi á flog. Men keðiligt er tað ikki.

## Havið

Ólavur fer upp við hønunum hvønn morgun og fer til verka beinanvegin. Hann er altíð ígongd við onkrum, einari útvarpssending, einari grein, ella skrivar fax til fólk innan kórhópin í øðrum londum. So tá ið eg viðhvørt ringi, fyri at spyrja um eitthvørt, er hann altíð í »full viðgør«. Onkrar morgnar um summarið er tó annaðleiðis. Kona hansara Ása greiðir frá, at Ólavur er farin ein rógvitúr út á Glyvursnes – einsamallur. Um ellivu tíðina er hann so kanska at hitta aftur í telefonini og tá hevur hann eisini svomið har úti við Glyvursnes. Síðst eg visti, hevði hann eisini keypt sær kavaradrakt og ætlaði sær at royna at kava. Eg kann ikki annað enn halda, at hann er óførur. Kann ikki ímynda mær Ólav, sum ein mann, ið fellur í fátt – tað hóskar ikki til hansara. Havið stendur honum nær. Eigur eitt fullriggað far, »Svíningin«, ið gongur skjótt. Tað hóskar til hansara. Mangan góðveðursdag er hann als ikki at hitta á landjørðini, men stimar runt oyggjarnar, sum hann heldur ómetaliga nógv av. Tá ið synirir, Heini og Hjálmar, hava luttikið í kappróðrinum her heima, hevur Ólavur gingið á odda, fyri at fáa so gott úrslit, sum gjørligt. Hann hevur gjørt venjingarætlanir, verið við til hvørja venjing og ikki minst staðið fremst á skerinum og heppað til kapp-róðrarnar. Altíð við lív og sál.

## Kór og Kingo

Ólavur hevur havt ein stóran týdning fyri føroyskt kórlív líka síðani hann eftir lokna útbúgving kom niðri frá og stovnaði Útvarpskórið fyri 35 árum síðani. Hansara leiklutur avmarkar seg tó ikki til hetta kór, ið seinni kom at eita Havnarkórið, men fevnir um mangt annað innan tónleikalívið í Føroyum. Soleiðis var hann ein tann fyrsti at fáa navnframar kórleiðarar úr Evropu higar at geva neyðugan íblástur til kórini, orkestur og kórleiðarar her heima. Tað munnu vera nógv, ið framvegis minnast fyrstu ferð Willi Gohl kom til Føroya og leiddi framførslurnar av »Messa í G-dur« av Franz Shubert. Hetta var fyrst í sjeytiárunum. Sjálv var eg lítil smágenta tá, men eg minnist mamma mín hevði myndir har heima av júst hesi framførsluni, sum hon sjálv hevði verið við í. Eg minnist, hvussu eg plagdi at sita og hyggja eftir myndunum av hesum fremmandamanni, solistunum og ikki minst teim ungu íslendsku gentunum við langum hári, sum spældu violin. Eg varð bergtikin og hesar myndir hava brent seg fastar í mítt minni. Fyrst í sekstiárunum ferðaðist Ólavur runt um í Føroyum og vitjaði fólk, ið dugdu at syngja Kingo. Við sær hevði Ólavur bandupptakara og var hann soleiðis við til at bjarga hesum sangskatti, ið kanska annars var farin fyri skeyti »med alla«. Hartil skal so nevnast Karl Clausen, og seinni, dóttirin Marianna, ið eisini eiga stóra æru í, at okkara Kingosangir eisini eru til á pappírinum. At vit í Føroyum hava ein Musikskúla er Ólavi at takka fyri, tí her spældi hansara áræði og hugsjón tann størsta leiklutin í, at ein slíkur skúli varð settur á stovn.

Atlantsljómur, henda megnar kórstevna, sum hevur til endamáls at sameina tónleikarar og kórsangarar um Atlantshavið, er eisini hugskot, sum Ólavur fekk og gjørdi til veruleika. Hon hevur givið okkum luttakarum nógv bæði tónlistarliga og menniskjaliga, tí hon knýtur varandi vinarbond. Tann feskasta ætlan Ólavs er at seta á stovn ein sangskúla líknandi tann, tey hava í Reykjavík. Higartil hava tveir sanglærarar ferðast úr Íslandi eina tríggjar ferðir um árið og undirvíst, og sigast má, at áhugin at luttaka er stórur. Serstakliga ímillum tey ungu. Og hetta er at gleðast um.

## Tillukku »hin gamli«

Eg kundi tikið fram mangt annað, har Ólavur hevur havt virknan leiklut. Men hetta skuldi fyrst og fremst vera ein føðingardagsheilsan til hansara á sjeytiára degnum.

Eg dugi tíanverri ikki at greiða betur frá hansara upphavi, veit bert at greinar ganga til Svínoyar, Vestmanna og Kvívíkar. Kenni ikki »slagið« sum man plagar at siga her í Føroyum. Fyri meg og okkum í kórinum hevur tað sikkurt heldur ongan týdning. Fyri okkum er Ólavur nokk. Hann fyllur rúmið. Okkum tørvar ikki annað.

Havnarkórið ynskir tær hjartaliga tillukku við teim sjeyti árunum ídag.



gult cyan magenta svart



**ORÐ OG MYNDIR. Ein hugleiðing um framsýningina hjá Rannvá Pálsdóttir Kunoy, eftir Oddfríða Marna Rasmussen. Framsýningin var í Listaskálanum fyrraárið. Í síðstu viku varð Rannvá heiðrað við fyrsta gávugóðsi úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum**

# Ímillum X'ini



HUGLEIÐINGAR Á FRAMSÝNING

*Tekstur: Oddfríður M. Rasmussen*

*Myndir: Rannvá P. Kunoy*

Eg taki ein tvørskurð av einum hjarta og lati tað saman við spritti í eina glaskrukku. Ímillum heimin og húðina er hin livandi líðingin. Oftani verður sagt, at vit gera okkurt hálvhjartað. Vil tað siga, at bert tvey hjartarúm eru í brúki. Nei, alt sum vit gera, gera vit við heilum hjarta (ella við heilum heila), við øðrum orðum vit noyðast at gera tað: Vit noyðast at mála, vit noyðast at skriva, sjálvt um vit vilja ella ikki. So er spurningurin um vit duga, men noyðast vit, so duga vit. Ímillum heimin og húðina er hin livandi líðingin. Eg fari nærri at hjartanum. Lýsi við lummalykt. Litir fáa skap og skuggar stinga seg út úr ljósspælinum. Hetta hjartað sat einaferð fast í einum kroppi, hevði lív, hevði rútmu. Hetta hjartað hugsaði ikki, men gjørdi tað møguligt hjá restini av kroppinum at virka í sambandi við aðrar kroppar. Eg flyti lummalyktina eitt sindur, og ljósið fær eitt annað skap. Vøddar og spengur traðka fram, spleysaði saman til fast kjøt. Tómar æðrar stinga seg fram, sum myrkir og forvitnisligir tunnlar, ið greina seg inn í tað endaleysa.

Ímillum heimin og húðina er hin livandi líðingin, og eg váli í eini siðsøgu. Sum børn fáa vit at vita, at list er ein endurspegling av veruleikanum. Spurningurin er, um tað í føroyskari list er pláss fyri, at fara út um mark - út um veruleikan? Svarið er, ja! Listin er ikki náttúra. Listin er ónáttúrlig. Listin er ikki ein endurspegling av veruleikanum. Listin er eitt spæl, ið tíðum er nær hjá og tíðum er langt frá og soleiðis setur seg í sjálvstøðuga relieff til tann veruleikan, ið vit kenna til. Ella, tá ið tað uppfatandi eygað bronglar veruleikan, sum hann er – tað er list. List er ein frísett teori um hvussu veruleikin, hvussu alt, ið hevur við lívið og deyðan at gera, kundi sæð út.

Ímillum beinagrindina og húðina er samtilveran. Eg'ið tekur eitt eyga og letur tað saman við spritti í eina glaskrukku. Setir krukkuna so, at eyga sær, tá ið eg'ið leggur vinstra mjadnabein undir røntgentólið at avmynda. Ein satellittmynd av eystursíðuni av Norðuramerika, kanska? Har liggur New York, kanska? Ímillum beinagrindina og húðina er samtilveran. Eg'ið uppfatar ikki, at kjøtið er har, men av royndum veit tað, at ímillum beinagrindina og húðina er kjøtið. Myndin er nú formleys – ein formleys avmyndan av einum møguligum alheimi.

Tað sjálvstøðuga listaverkið sendur spurningar til hyggjaran. Spurningar, sum hann kennir aftur frá sínum egnu løtum í lívinum, sum hyggjarin kanska ikki hevur skilt, men sum hann noyðist at hyggja eftir ferð eftir ferð fyri at skilja - fyri at eyðmerkja.

Ímillum fortíðini og nútíðina er endurtøkan. Knívurin borar seg inn í mønuna á seyðinum. Eygini rulla í høvdinum. Ein annar knívur borar seg inn aftanfyri barkan og sker hann av. Eitt barn hyggur. Blóðið rennur niður í eitt fat. Lívið fer burtur úr kroppinum. »Eg eri fimm ár«, sigur barnið við ærina. Ímillum fortíðina og nútíðina er endurtøkan. Teir gera landgongd. Uppi á bakkanum speglast ein hugtoygd mynd í vátum eygum. Menn skera á háls. Blóðið rennur út á fjøðrin. Fjøðrurin fær litin av uppøstari fjøld, ið hugsar sama tanka. »Lat lívið renna í havið«.

Í nútíðini er einasti møguleikin at varðveita endurtøkurnar. Eg siti í einari svart/hvítari mynd. Einasti mátin at skræða seg úr rammuni, er at noyða blóðið úr kroppinum – úr rammuni. Men blóðið er altíð reytt. Hevur altíð blóðsins lit. Hevur litin av líðing og lívi. At liva lívið innan fyri rammuna, er tað sama sum at hugsa uttan hugflog. At toyggja seg útum rammuna, er at ferðast bæði innanfyri og uttanfyri periferiina og altíð vera til staðar.

Eg taki ein tvørskurð av einum heila og tvey eygu og lati tey saman við spritti í eina glaskrukku. »Blóð skal í allar tíðir flóta«, segði hjartað við eygað. »Ja. Ímillum heimin og húðina er lívið, men ímillum húðina og beinagrindina er tankin um lívið«, svaraði eygað aftur.